# Narayana vitjaði Vág

**Seglbáturin S/y Narayana vitjaði fríggjadagin 16. august á Vági, eftir hava verið á ferð í úr Miami síðani tann 30. juni. Steðgurin í Vági var stuttur, og hildið varð skjótt fram til Noregs, har ferðin endar**

BÁTAR
*Dagfinn Olsen*

Norski seglbáturin, N/Y Narayana, lá fríggjadagin á Vági, og tá hevði manningin ikki nomið land, síðani fráferðina úr Miami tann 30. juni.

Málið er at koma til Steigen í Noreg.

Tað eydnaðist ikki tygara útsenda at fáa orð á manningina, ið nýtti stuttu tíðina í Føroyum at hvíla í. Tær ferðirnar, vit hugdu framvið á bryggjuni, var eingin omandeks. Men fylgjast kann við ferðini hjá Narayana á internetinum. Har sæst, at ætlanin júst hevuir verið at koma til Suðuroyar hóskvøld. Har er samband til góð hjálparfólk, ið skulu koma til hjálpar at fáa seglbátin trygt í Havn og ein Magni skal setast av. Hetta sæst í dagbókini, ið sæst á netinum, og eisini sæst, at skiparin eitur Jan Erik.

Eisini sæst kort yvir afturum løgdu ferðina og frágreiðing og myndir av ódnini Arthur, sum trupulleikar hava verið av á ferðini.

Leygardagin var Narayana farin víðari. Talan er um seglbát úr træi. Í skrivandi løtu er heimasíðan bert dagførd til tann 15. august, har taðå sæst, at komið er undir føroyar.

Fylgjast kann við ferðini hjá Narayana á heimasíðuni http://www.kun.nl.no/atlanter.html



*Norski seglbáturin Narayana vitjaði fríggjadagin 16. august á Vági, eftir fráferð úr Miami tann 30. juni*
*Mynd: Dagfinn Olsen*

# Sakarina spælir til dans á Skála

**Skála Ítróttarfelag**
*TÍÐINDASKRIV*

Skála Ítróttarfelag tekur táttin frá í fjør uppaftur og skipar enn einaferð fyri stórum dansitiltaki í ítróttarhøllini. Hesaferð verður tað kendi norski dansibólkurin Sakarina, sum fer at spæla til dans.

Í fjør brettu skálafólk upp ermar og skipaðu fyri einum stórum dansitiltaki í ítróttarhøllini. Byrjað varð við stórum borðhaldi, har umleið 500 fólk fóru til borðs, meðan Hilmar Jan Hansen undirhelt gestunum. Eftir borðhaldið trein kendi norski dansibólkurin Scandinavia fram á pallin, og hann spældi góðan dansitónleik til klokkan var umleið fýra.

Tiltakið eydnaðist stak væl. Gestir, fyrireikarar og ikki minst tónleikararnir vóru serstakliga væl nøgdir við kvøldið, og tað hevur givið skálafólkið blóð á tonna. Tí skipar felagið fyri líknandi tiltaki aftur tann 5. oktober í ár.

Hesaferð hevur Skála Ítróttarfelag fingið kenda norska dansibólkin Sakarina at spæla til dans.

Sakarina varð stovnaður í 1982 og hevur sín uppruna í Norðurnoregi. Fimm tónleikarar eru í bólkinum. Serliga 15 tey fyrstu árini var bólkurin kendur fyri at spæla á teimum nógvu kendu dansibandsfestivalunum í Noregi.

Bólkurin var við á fyrsta festivalinum í Seljord. Hann hevur eisini verið við í Tromsø, í Førde, Orkla, Alta, Lakselv, haraftrat var hann við, tá skipað varð fyri stórari dansigalla í Nerpe í Finnlandi.

Í 1997 gav Sakarina sína fyrstu fløgu út. Fløgan »Sakarina« fekk ógvuliga góða undirtøku, tá hon kom út, og longu árið eftir hevði bólkurin fingið fótin fastan á Dansetoppen hjá NRK P1, sum er hittlistin fyri slíkar bólkar. Har hevur hann ligið meira ella minni fast líka síðan.

Í apríl mánaði í 2000 gav bólkurin aðru fløgu sína út, og »Kvinnen i mit liv« hevur fingið líka góða undirtøku, sum tann fyrra. Hetta hevur m.a. borið í sær, at bólkurin í heila tikið hevur fingið nógvar nýggjar fjepparar, og hann er nógv umbiðin at spæla til dans kring um í Noregi. Seinni í heyst er ætlanin at triðja fløgan hjá bólkinum skal koma á marknaðin.

Sakarina spælir mest egnan tónleik av fløgunum, men teir smæðast ikki fyri at spæla løg hjá øðrum kendum bólkum við. Hetta ger tónleik teirra fjølbroyttari, og skuldi tað eisini borið við sær, at tað verður spennandi og fjølbroyttur dansur á Skála tann 5. oktober.

Farið verður at selja atgongumerkir til tiltakið á Skála um mánaðarskiftið, og tá verður lýst nærri, hvar atgongumerkini vera at fáa.




## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum, sum mintust meg á 85 ára degnum 27. juli við at vitja inn á gólvið, við uppringingum, telegrammum og gávum. Takk fyri øll somul.

**Bestu heilsanir**
**Jona Eidesgaard**




Byrsumaður dømdur:

# Skal hava hjálp fyri trupulleikar

**Fríggjadagin kom maðurin, sum skeyt eftir politinum fyri góðum fimm vikum síðani, í rættin. Har varð hann dømdur sjey mánaða fongsulsrevsing, harav fýra mánaðar eru treytaðir**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Rætturin kom ásamt um, at skjótingin eftir løgregluni við Sundsvegin fyri góðum fimm vikum síðani, var meira eitt róp um hjálp enn nakað annað. Og hetta er grundgevingin fyri, at rætturin valdi at geva manninum ein sokallaðan kombineraðan dóm, sum sigur, at hann skal sita inni í tríggjar mánaðar, meðan fýra mánaðar eru treytaðir.

– Hesin dómurin er kanska eitt sindur óvanligur, tí maðurin hevði fleiri álvarsamar ákærur. Ein av teimum var at skjóta eftir politinum í tænastu. Men kriminalforsorgin hevur givið okkum nakrar frágreiðingar, so vit kunnu væl grundgeva fyri, hví vit hava valt henda kombineraða dómin, sigur Linda Hesselberg, ákæri.

Ákærin vísir á, at rætturin metir, at viðhvørt er tað ikki bara revsing, sum hjálpir hjá viðkomandi. Men afturfyri at fáa ein kombineraðan dóm, so skal tann 39 ára gamli maðurin hava hjálp frá fakfólki. Hann skal nú sita í arrestini, har hann fær hjálp ímóti alkoholmisnýtslu, umframt at hann fær hjálp við sosialum og psykiskum trupulleikum. Hetta skal hann síðani halda fram við, tá hann fer undir tann treytaða dómin.

Ákærin vildi hava millum seks og sjey mánaða fongsulsrevsing, og hetta endaði við sjey.

– Tað, at vit hava valt ein kombineraðan dóm, er tikið út frá tí einkulta persóninum. Hetta vil ikki siga, at vit fara at halda okkum til hetta næstu ferð, um tað skuldi hent aftur. Men hesuferð varð mett, at fyri at sleppa frá at síggja mannin aftur í hesum samanhanginum, kundu vit best hjálpa honum á henda hátt, sigur Linda Hesselberg.




# Eldur í koyrandi bili



*Eldur kom í koyrandi bil við Leitisvatn á Vágoynni sunnudagin. Ongin veit at siga, hví eldur kom í*
*Mynd: Edvard Joensen*

ÓHAPP
*Ingrid Bjarnastein*

Sunnudagin kom brádliga eldur í ein koyrandi bil. Bilurin var staddur beint við Leitisvatn á Vágoynni.

Politiið í Vágunum veit ikki, hví eldur kom í bilin, men bilurin kolaðist upp allur sum hann var. Ongin fólkaskaði var av eldinum.

Brandmenn vóru við til at sløkkja eldin, men bilurin er so illa farin, at har er onki at síggja, og tí ber ikki til at finna útav, hvør orsøkin til eldin var.


